

# Alt landið

**Tann ið koyrir oman á havnarlagið í Funningsfirði, kann ikki umganga at síggja teir nógvu plattarnar ið standa á økinum. Við fyrsta eygnakast líkjast teir allir, men um ein hyggur betri eftir, sær ein at teir eru ymiskir í tjúkd og stødd – í roynd og veru er talan um sjey ymisk sløg. Hetta er gjørt fyri at teir kunnu lúka tær ymisku treytirnar ið teir ymisku kundarnir seta.**

**Fyrsta fyritøkan sum keypti plattar frá Atlantshav var Bakkafrost á Glyvrum. Síðani hava flakavirki kring landið keypt sínar plattar higani, og nú aftur alivinnan ið hevur verið í menning.**

**– Tað er faktist so, at allur tann føroyski fiskaútflutningurin fer av landinum á einum av okkara plattum, sigur Ingolf Rasmussen, driftsleiðari. – Her er bæði talan um útflutning av saltfiski, alifiski ella til frystum fiski.**

**ÚR AT GERA**

*Teir báðir á Atlantshavn – vinstrumegin Eddie Mikkelsen og Ingolf Rasmussen – hava framleitt túsundtals og aftur túsundtals plattar tey seinastu 15 árini. Her standa teir við einum teirra, ið varð framleiddur mikudagin í farnu viku*

**HEILAUTOMATISK**

*Nýggja framleiðslumaskinan hjá Atlantshav kann framleiða 300 plattar um tíman. Bert tveir mans tørvast til framleiðsluna. – Hon er sera effektiv, sigur Ingolf Rasmussen, sum her fyllir fjalar í eitt av magasinunum*